# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Íverksetarar stóran týdning

Íverksetarar hava stóran týdning fyri máttin og vøksturin í búskapinum í einum samfelagi. Tað er í nýggjum virkjum og fyritøkum, at nýggj hugskot koma undan kavi og verða roynd. Íverksetarar bjóða verandi virkjum av og økja um kappingina. Nakað soleiðis verður tikið til í tí visjónsskjali, sum fyri einum ári síðan varð lagt fyri almenningin.Her var samstundis staðfest, at eins og fólk í øðrum Norðurlondum vilja nógvir føroyingar stovna egið virki.
Hetta sigst at vera ein partur av eini serstakari norðurlendskari vinnumentan. Grundarsteinurin undir einum samfelagi við nógvum íverksetarum er ein mentan, sum er eyðkend við viljanum og evnunum at hugsa nýtt, og sum vísir vilja og dirvi. Síðan visjónin hjá undanfarnu samgongu varð kunngjørd hevur lítið og einki sæst eftir tað stóra arbeiði, sum varð lagt niður í visjón 2015.
Tað er, sum eingin í roynd og veru vil taka sær politisku ábyrgdina av hesum frálíka initiativi. Men onkur úti í samfelagnum tykist hava áhuga og áræði at taka upp tættir úr vísjónstilfarinum. Týskvøldið 22. apríl verður tiltak í Øravík, har íverksetan er á skránni. Tað er íverksetarahúsið í Klaksvík, sum stendur fyri tiltakinum. Íverksetarahúsið er eitt gott og nýskapandi tiltak, og stigtakarnir hava so tikið løgmann og hansara visjónslið í størsta álvara.

Í Øravík verður gjørd ein roynd at útgreina nakrar grundleggjandi spurningar, sum eru aktuellir hjá komandi íverksetarum sum til dømis hvør hjálp fæst frá Íverksetarahúsinum, hvussu tær almennu Føroyar møta íverksetum, og hvørji krøv verða sett fyri at kunna stovna fyritøku. Eisini fer royndur íverksetari at greiða frá, hvussu hann hevur byrjað fleiri fyritøkur við rímuligum undanvindi. Til seinast fer forkvinnan í nevndini í Íverksetarahúsinum at geva síni boð uppá, at tað ber til hjá íverksetum. Hetta tiltak átti at givið avvarandi myndugleikum nakað at hugsa um. Grundarsteinurin undir eini sterkari, sjálvstøðugari mentan skal leggjast í fólkaskúlanum, har næmingar arbeiða skipað við hugskotsmenning í øllum lærugreinum. Soleiðis ljóðaði ein boðskapurin frá teimum góðu høvdum, sum orðaðu visjónina fyri verksetan.

Føroyar skulu mennast til at vera eitt áhugavert stað hjá virkisfúsum fólki at byrja nýggja vinnu. Eitt fjøltáttað útbúgvingarverk skal vera ein virkin partur í at ala fram ein verksetarahugburð í samfelagnum. Tað skal loysa seg at skapa sín egna vinnuveg, tí samstundis sum íverksetarin tekur váða á seg, skulu útlitini til at vinna pening vera góð. Hesi vóru, sum flestøllum politikarum kunnugt, málini fyri íverksetarapolitikkinum. Hetta eru mál, sum einhvør eigur at kunna taka undir við.

**Sosialurin**

## Ja, ella hugburðsbroyting um bardagan

**ASTA HJELM**

**viðmerking til »Bardagin fyri trivna hjá børnum« og »hugburðsbroyting takk«**

Tað er við gleði eg lesi meiningina hjá Tóru við Keldu, har hon lýsir skúlanæmingar nú á døgum í mun til fyrr, og tíðargreinina hjá Kristan Holbæk, sum er ein lýsing av familju - og samfelags-broytingum tey seinastu árini.

Gleðin kemur av, at tað eru lærarar og foreldur í hesum nýggja føroyska samfelagnum, sum traðka í karakter og vilja verða so beinasom at koma við teirra íkasti. So at tað blívur meiri sjónligt fyri øllum, at tann gongdin sum er í løtuni, ikki er ok.

Um øll børn høvdu foreldur, sum førdu tankarnar hjá Kristiani út í lívi - at fara til Froðbiar at fiska, at liggja í telti í Vatnsdali, at lesa eina bók av og á og samstundis vóru fyrimyndir, so børnini læra toleransu og at tað ber til at skemtast um alt, ja,- so hevði lærarin havt nógv betur tíð og frið til at undirvísa.

Eingin ivi er um, at børn skulu hava kropsligar aktivitetir, rúm fyri kenslunum, innlæring, stuttleika sær, heilsugóðan mat, svøvn..... o.s.fr.

Tóra! - lýsingin hjá tær av næminginum samsvarar við tað, vit hava upplivaå tey seinastu árini á dagstovnaøkinum. Tað hevur undraå okkum í fleiri ár, at tað eru fleiri og fleiri foreldur, starvsfólk, leiðslur og lærarar, sum ikki traðka í karakter. Alt tykist samanskrúvað soleiðis, at onkur skal hava ábyrgdina av, at tað endar galið. Um tað ikki eru karmarnir, normeringarnar, ja so er tað børn, ið hava ein serligan tørv.

Eg haldi, at nú má tíðin verða komin til at gera støðuna upp! Fyri børnini er tað líka mikið hvør hevur ábyrgdina, bara onkur tekur hana! Vit hava øll skyldu yvir fyri børnunum at boða frá, tá barnið ikki trívist. Tá nøkur foreldur ikki røkka sína uppgávu, so mugu pedagogar og lærarar traðka til, - vit kunnu ikki halda áfram at siga, at uppalingin er foreldranna partur og so vóna tað besta.

Sjálvandi hava foreldur ábyrgdina av børnunum og hervið uppalingini, men pedagogar og lærarar hava skyldu at siga foreldrunum frá, at tað haltar, tá tað haltar.

Av tí at vit sum vaksin, sum eru rundanum børnini, ikki traðka í karakter gevur, hetta tíverri foreldrum tað uppfatan, at alt tað er ok, sjálvt um tað er átalu vert, so sum barnið uppførir seg.

Tað er nú einaferð so, at øll børn hava rætt til eitt gott og innihaldsríkt lív. Og tað inniber at vit í felag mugu lyfta tey børn, ið ikki fáa sínar fortreytir nøktaðar. Her haldi eg at politikararnir svíkja sína uppgávu!

- Tað er mangul upp á útbúnar pedagogar, eftirútbúgvingar og gransking á økinum. Lønin hjá pedagogum er so lág, at tað er láturligt at bjóða sær sjálvum hesa ábyrgd, sum starvið í nútíðar samfelagnum krevur. (Lønin hevur nógv at siga, halda okkara grannalond, tí er hækking upp á 3000 krónur uppá byrjunarlønina hjá pedagogum framd í Danmark)

Tað verður kravt av politikarum, at børn við serligum tørvi skulu hava eitt pedagogiskt tilboð inni á dagstovninum, og at vit skulu gera arbeiðsætlanir fyri tey seks ára gomlu. (Hóast grannalondini ganga burtur frá hesum, Grundin til tað er at tíðin gongur frá børnunum, og at tað gevur onga framgongd, tó halda føroyskir politikarar at hetta er loysnin)

Tá ið barnið er um trý ára aldur, er tað neyðugt at barnið dugir at skikka sær soleiðis, at tað kann góðtakast av øðrum, enn bert sínum nærmastu. Tá barnið kemur um skúlaaldur, skal tað kunna teir sosialu, spæli-, og samskiftis reglar har í so góðan mun, at barnið skal kunna góðtaka krøv, ávísingar og avvísingar! Barnið skal kunna taka tað til sín og gera tað, sum barnið verður biðið um at gera!

Hetta sær út til at mangla í stóran mun. Tað eru børn, ið ikki duga teir sosialu spæli- og samskiftis reglarnar og duga heldur ikki at málbera seg. Tey brúka ókvæmisorð og svara illa aftur! Hetta er ikki í lagi, og mugu vit í felag gera vart við at ósømiligur atburður ikki verður góðtikin.

Tað hevur stóran týdning, hvussu børn beganga seg. Um vit sum vaksin ikki læra børn, hvat góður siður og skikkur er, taka vit møguleikan frá børnunum, til at verða saman við øðrum.

Eg meini ikki, at tað er rætt at vit vaksnu allatíðina skulu átala børnini, men at tað er neyðugt at vit vísa á, at okkum dámar væl tann góða atburðin.

Um øll vaksin - foreldur, starvsfólk í Vøggustovum, barnagørðum, frítíðarskúlum, lærarar, grannar, ommur og abbar.- traðka í karakter, sum vaksin fólk og víst børnunum at vit vita, hvat tey hava brúk fyri og hvat er gott fyri tey. Tá trúgvi eg, at vit fáa børn sum duga at beganga seg, áðrenn tey fara í skúla.

Foreldur – ja - vit eru nakað kroyst ímillum playstasion, teknifilmar, góðgæti, arbeiði og ringa tíð.

Men fyrst og fremst er okkara ábyrgd børnini! - Vit hava ikki somu tíð til at útvikla okkum í, sum tá ið vit ikki høvdu børn. Tað er og skal altíð verið barnið, ið er nr.1 og nr.2 og nr.3 og so kanska vit. Summi halda tað verða strævið, ímeðan onnur halda, at tað er gevandi og uppaftur onnur hava ikki givið sær far um, at barnið er har.

Onkuntíð hoyri eg foreldur brúka orði kvalitetstíð. Kanska skilji eg ikki orðið, men eg veit at kvalitetur krevur tíð, og er tað nakað børn mangla er tað tíð saman við vaksnum positivum fólkum. Tað er alneyðugt at foreldur, lærarar og starvsfólk á dagstovnaøkinum eru glað, tíma og geva børnum innihald í gerandisdegnum.

Einki er so drepandi fyri menningina sum súr vaksin og tungur stemningur.

Hetta er ein áheitan á øll foreldur, starvsfólk á dagstovnaøkinum, lærarar og vaksin fólk annars, um at taka uppgávuna í álvara og við gleði, tí børn okkara eru sum Kristian sigur í tíðargrein síni, deiligastu skapningar á jørð.

Um uppgávan hjá okkum verður svikin viðvíkjandi okkara børnum, kann skapningurin skjótt gerast tað mótsetta. (upplivast sum ódjór)

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo
Joan Abrahamsen joan@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.